# Pensjónin hækkar upp í næstan 10.000 krónur



*Við at styrkja samhaldsfasta eftirlønargrunnin, kunnu vit hækka pensjónina munandi uppá heilt fá ár. Annars tekur tað eini 30-40 ár at byggja upp eina líkinda pensjón, sigur Hans Pauli Strøm*

**Tey næstu fýra ella fimm árini fer pensjónin at hækka munandi og tað verður ein sera stórur bati hjá pensjónistum, heldur Hans Pauli Strøm**

SKATTALÆTTI OG PENSJÓN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tey næstu árini fer fara tey eldru at fáa munandi meiri í pensjón enn tey fáa nú.

Tað er úrslitið av pensjónsavtaluni hjá sitandi samgongu.

Tá ið samgongan varð skipað, samdust hon um at lække skattin og at hækka pensónina og hesi bæði málini hoyra óloysliga saman, sigur løgmaður.

Úrslitið av skattalættanum hava vit hourt nógv um seinastu tíðina.

Men úrslitið av pensjónsavtaluni er, at um eini fýra ella fimm ár, fer ein stakur pensjónistur at fáa ímillum 9.000 og 10.000 krónur í pensjón um mánaðin og eini hjún fara at fáa góðar 16.000 krónur í pensjón.

Her er talan um pensjónistar, sum fáa fulla pensjón og fulla viðbót. Og hjá øllum vanligum pensjónistum er pensjónin at kalla skattafrí.

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, sigur, at eftir pensjónsavtaluni hjá samgonguni, skal útgjaldið úr Samhaldsfasta Eftirlønargrunninum hækka munandi tey næstu fýra fimm árini.

Í løtuni betala løntakarar 0,5% av lønini í samhaldsfasta eftirlønargrunnin og arbeiðsgevarar betala 0,5% í grunnnin av øllum útgoldnum lønum.

Men nú skal gjaldið hækka so líðandi so at tað um trý ár er komið upp í 1,5% frá hvørjum parti, ella 3% tilsamans og sostatt verður inngjaldið trýfaldað.

- Í løtuni er gjaldið úr samhaldsfasta góðar 700 krónur um mánaðin. Men økta inngjaldið førir við sær, at longu um fimm ár, er gjaldið úr grunninum komið komið upp á einar 2.000 krónur um mánaðin til hvønn pensjónist.

Hann sigur, at saman við eini dagførdari fólkapensjón fer hetta at geva einum støkum pensjónisti við fullari viðbót, ímillum 9.000 og 10.000 krónur í eftirløn um mánaðin og einum hjúnum góðar 16.000 krónur, sigur landsstýris-maðurin

- Við at leggja stóran dent á Samhaldsfasta Eftirlønargrunnin, ber til at fáa eina skipan, sum rættiliga skjótt kann veita eina munandi hægri eftirløn enn fólk fáa í dag.

- Skuldi talan harafturímóti bara verið um eina eftirlønarskipan, har hvør einstakur skuldi spara upp til sína egnu eftirløn, hevði tað tikið eini 30-40 ár, áðrenn nakar hevði fingið eina munagóða eftirløn, sigur Hans Pauli Strøm.

### Byggir á tríggjar súlur

Hann sigur, at framtíðar eftirlønin skal byggja á tríggjar súlur, tvær almennar og eina privata.

Tær báðar almennu súlurnar eru fólkaspensjónin og Samhaldsfasti Eftirlønargrunnurin.

Hesar báðar súlurnar skulu vera grundarlagið undir eftirlønini.

Privata súlan undir eftirlønarskipanini, eru tær avtalur, sum hvørt einstakt fakfelag sær ger eftir hvat tað heldur vera rætt og hon verður so løgd afturat teimum almennu súlunum.

Men av tí at tær almennu súlurnar geva so mikið nógv, fer tað at gera kravið um at spara til sína egnu pensjón, minni.

– Høvdu vit ikki havt tær almennu, samhaldsføstu pensjónirnar, hevði kravið um sjálvuppsparing til pensjón, verðið so stórt, at fólk við vanligum inntøkum høvdu ikki klárað tað. Tí leggja vit sera stóran dent á Samhaldsfasta, sigur landsstýrismaðurin.

Hann leggur afturat, at samstundis situr ein nevnd og greinar út, hvussu ein semja kann finnast ímillum partarnar á arbeiðsmarknaðinum um eina privata eftirløn.

- Talan verður um eitt minstakrav til, hvussu stóran part av lønini, arbeiðsgevarar og løntakarar skulu betala inn í eina privata eftirlønarskipan. Men halda tey tað vera rætt, kunnu tey sjálvsagt betala meiri.

Sí eisini greinina "Skattalættin var prísurin fyri eina munandi hækking í pensjónunum" aðrastaðni í blaðnum.

# Skattalættin var prísurin fyri eina munandi hækking í pensjónunum

**Tað harmar løgmann, at fakfeløg bara hugsa um, hvussu lítið tey fáa burtur úr skattalættanum. Tey áttu eisini at hugsa um, at um trý ár er pensjónin hækkað upp í 10.000 krónur um mánaðin**

SKATTLÆTTI OG EFTIRLØN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Trøðini veksa ikki inn í himmalin og hetta var prísurin.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður og formaður í javnaðarflokkinum, viðgongur, at skattalættin, sum júst er samtyktur, smakkar ikki væl.

Men hann heldur kortini, at atfinningarnar ímóti honum eru alt ov einoygdar.

Tí afturfyri skattalættan, fáa bæði verkafólk og øll onnur, stórar ábøtur í pensjónunum.

– Og tað harmar meg, at Arbeiðarafeløgini bara síggja, hvussu lítið teirra lættanum. Tey áttu eisini at sæð, hvussu nógv verkafólk nú fer at fáa afturat í eftirlønum, heldur løgmaður.

Tí er hann ikki heilt samdur við arbeiðarafeløgunum, tá ið tey høgga eftir javnaðarflokkinum fyri at hava góðtikið ein skattalætta, sum bara lívgar tey vælbjargaðu ímeðan verkafólkið at kalla onki fær burturur.

Í Sosialinum mikudagin funnust bæði formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag og forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag harðliga at skattaættanum og at javnaðarflokkinum og hvørgin teirra skilti, hvussu javnaðarflokkurin kundi ganga við til ein so órættvísan skattalætta. Havnar Arbeiðsmannafelag metti eisini, at skattalættin var ómetaliga óheppin fyri friðin á arbeiðsmarknaðinum, tá ið hugsað verður um, at lønarsamráðingar skulu vera í vár.

Jóannes Eidesgaard minnir á, at javnaðarflokkurin er í samstarvi við tveir borgarligar flokkar og tí er førdi politikkurin ein neyðsemja ímillum teir tríggjar flokkarnar.



*Varð ongin skattalætti, varð heldur ongin hækking í pensjónini. og varð ongin hækking í pensjónini, varð heldur ongin skattalætti. So einfalt setir løgmaður støðuna upp ogh ann heldur at tað er skeivt, bara at finnast at skattalættanum uttan eisini at fegnast um, at pensjónirnar hækka munandi*

veruleikin og tað noyðast vit at rætta okkum eftir.

Annars veit løgmaður ikki um hesin skattalættin

skattalættar, sum eru lætnir.

– Men eg skal viðganga, at ráddi javnaðarflokkurin einsamallur fyri, hvussu skattalættin skuldi vera hevði hann sæð øðrvísi út.

Annars heldur Jóannes Eidesgaard, at skattlættin er ikki so heilt burturvið, sum hann verður gjørdur til.

– Hann tekur hámarksskattin á miðalinntøkunum burtur og tað er í hesum lønarbólki, at nógv største fjøldin av fólki er.

Men tá ið vit hava eina progressiva skattaskipan, raka skattalættin altíð uppeftir, tí verða mørk flutt í neðra, verða tey eisini flutt longri uppi.

– Bara at hugsa um lønarbólkin uppá 170.000 krónur um árið og tey, sum forvinna 500.000 krónur um árið er eitt ómetaliga langt lop. Har ímillum eru nógvir lønarbólkar, sum fáa heilt fitt burturúr skattalættanum.

Annars heldur løgmaður, at umframt at lække skattin, soleiðis sum hann nú er lækkaður, hevur samgongan eisini avtalað at hækka eftirlønirnar munandi. Og hann heldur, at arbeiðarafeløgini átti eisini at hugsa um tað, tí tað er eitt risa

um, tí hetta er nakað, tey hava sóknast eftir í nógv ár.

– Men tað er kanska okkara egna mistak, tí vit hava kanska ikki dugað so væl at upplýst um, at tey komandi árini fara eftirlønirnar at hækka munandi tað skal gerast við at hækka útgjaldið úr samhaldsfasta og við at hækka pensjónirnar.

– Tað er onki yvir at dylja at júst hesi viðurskifti eru hjartamál hjá javnaðarflokkinum, sum vit altso hava avtalað at lyfta upp á eitt heilt annað støðið í hesum valskeiðnum.

– Tá ið fleiri flokkar skulu samstarva, mugu neyðloysinr til. Og í hesum føri er støðan tann, at varð skattalækkingin ikki framd, fingu vit heldur ikki hækka pensjónirnar. Og fekst ikki ein avtala í amgonguni um at hækka pensjónirnar, hevði heldur ongin skattalætti verið, so einføld er støðan í veruleikanum, sigur løgmaður.

Og hann dylir heldur ikki fyri, at hóast javnaðarflokkurin onki hevur ímóti skattalætta sum so, heldur hann at vinningurin hjá javnaðarflokkinum í hesum føri liggur í, at tað eydnast at lyfta pensjónirnar upp.

samhaldsfasta, eigur hann ikki so nógvar vinir í politikki, tí hann er bara einaferð áður hækkaður og tað var eisini við javnaðarflokkinum í samgongu fyri einum 10-11 árum síðani.

– Men forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag hevur sjálv sitið á tingi, so hon veit, at politisk telving skal til fyri at fáa alt at ganga upp og afturfyri at fáa pensjónirnar upp, mátti vit ganga hinum flokkunum á møti við at lække skattin, soleiðis sum tað nú er gjørt. tey bæði viurskiftini hanga óloysiliga saman hjá okkum, sigur løgmaður.

Annars vónar hann ikki, at skattalættin fer at føra til órógva á arbeiðsmarknaðinum, soleiðis sum formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag stúrir fyri.

– Tað vóni eg sanniliga ikki, tí okkara royndir av ófriði á arbeiðsmarknaðinum er tær, at har eru bara taparar.

Sí eisini greinina "Pensjónin hækkar upp í næstan 10.000 krónur" aðrastaðni í blaðnum.